# Løgmaður vil hava nýggjan studentaskúla í Marknagili






**Jóannes Eidesgaard segði á veljarafundi á studentaskúlanum á Kambsdali í gjár, at Javnaðarflokkurin ynskir at byggja nýggjan studentaskúla í Marknagili. Útsøgnin er ímóti tí, sum formaðurin í tingbólki Javnaðarfloksins, Kristian Magnussen, í seinastu viku segði við Sosialin**

ÚTBÚGVING
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

- Vit vilja gjarna byggja nýggjan studentaskúla í Marknagili. Men innihaldsliga skulu vatntøtt skott setast ímillum studentaskúlan og hinar skúlarnar, tí studentsútbúgvingin riggar sera væl í dag.

Soleiðis segði Jóannes Eidesgaard, løgmaður, á veljarafundi í auluni á studentaskúlanum á Kambsdali týsmorgunin.

Nógv fokus hevur verið á júst Javnaðarflokkinum viðvíkjandi spurninginum um, hvar ein nýggjur studentaskúli í Havn skal liggja, tí Javnaðarflokkurin hevur verið einasti flokkurin, sum hevur verið ímóti at gera studentaskúlan í Hoydølum til part av skúladeplinum í Marknagili, sum í dag umfatar Tekniska Skúla og Handilsskúlan.

Hetta skrivaði Sosialurin í seinastu viku, tá allir flokkarnir á tingi vórðu spurdir, hvar nýggi studentaskúlin skal liggja. Kristian Magnussen úr Javnaðarflokkinum var tann einasti, sum segði seg vera part av einum flokki, sum var ímóti eini semju um at byggja nýggjan studentaskúla í Marknagili. Og allir hinir flokkarnir søgdu tá, at Javnaðarflokkurin hevur higartil forðað fyri eini semju.

### Nýggjar útsagnir frá C

Men síðani tá eru fleiri aðrar útsagnir komnar frá Javnaðarflokkinum, og tað kundi bent á, at flokkurin ikki er samdur um spurningin.

Bæði javnaðarvalevnini Helena Dam á Neystabø og Eyðgunn Samuelsen gjørdu eftir í lesarabrævi í seinastu viku vart við, at Javnaðarflokkurin ikki skal liggja í buktini fyri nýggjum studentaskúla, og síðani segði Heðin Mortensen, borgarstjóri, at tað ikki kemur upp á tal, at nýggjur studentaskúli skal byggjast í Hoydølum, tí tað gongur ímóti byggisamtyktini hjá Tórshavnar kommunu.

Og nú hevur floksformaðurin so sjálvur melda út á veljarafundi á Kambsdali týsmorgunin, at Javnaðarflokkurin vil hava nýggjan studentaskúla í Marknagili. Ein ætlan, sum Javnaðarflokkurin annars var ímóti sambært Kristiani Magnussen í seinastu viku. Og sum flokkurin sambært øllum hinum flokkunum eisini hevur verið.

Javnaðarflokkurin hevur eisini skrivað í tíðindaskrivi í vikuni, at "fyri at rudda allan iva burtur, skal Javnaðarflokkurin gera greitt, at flokkurin fult og heilt stuðlar ætlanini at byggja nýggjan studentaskúla í Havn". Men tað er einki nýtt. Knúturin er, júst hvar í Havn skúlin skal liggja, og tað sigur tíðindaskrivið einki um.

Løgmaður legði dent á, at uttan mun til, hvar skúlin skal liggja, eigur skipanin innihaldsliga at varðveitast, sum hon er í dag, har skúlarnir framhaldandi skulu virka sum sjálvstøðugar eindir.

*- Vit vilja gjarna byggja nýggjan studentaskúla í Marknagili. Men innihaldsliga skulu vatntøtt skott setast millum studentaskúlan og hinar skúlarnar, tí studentsútbúgvingin riggar sera væl í dag, segði løgmaður á veljarafundi á Kambsdali týsmorgunin. Ein útsøgn, sum líkaði Bergi Johannesen úr Miðnámsflokkinum, og sum her kjakast við løgmann um sama evnið*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Samtykt um sandoyartunnilin stendur við

**Allir flokkar á tingi uttan Sjálvstýrisflokkurin søgdu á veljarafundi á Kambsdali í gjár, at løgtingssamtyktin um Sandoyartunnilin ikki verður broytt**

Á veljarafundi á Kambsdali týsmorgunin snúði ein partur seg um undirstøðukervið í Føroyum og serliga um løgtingssamtyktina um at gera ein undirsjóvartunnil til Sandoynna, sum mong hava funnist at, m.a. við at savna inn mótmælisundirskriftir.

Men allir floksformenninir á tingi siga seg halda fast um samtyktina og ætlanina at gera fast samband til Sandoynna. Uttan Sjálvstýrisflokkurin.

- So leingi sum vit ikki hava nakra ætlan um, hvussu hesin tunnilin skal fíggjast, eri eg ikki fyri hesi verkætlan, segði formaður floksins Kári P. Højgaard á veljarafundi á Kambsdali týsmorgunin. Bergur Johannesen, einasta valevni hjá Miðnámsflokkinum, segði eisini, at hann var ímóti at raðfesta ein undirsjóvartunnil til Sandoynna júst nú.

- Vit halda tað vera rætt at útbyggja samferðsluøkið og fáa betri og betri samband við útjaðaran, men vit halda ikki, at lagaliga løtan er komin til ein tunnil til Sandoynna, tí tað liggja so mong onnur mál á láni, sum skulu gerast áðrenn. M.a. alt útbúgvingarøkið, segði Bergur Johannesen.

**HíS**